# KT-trygdarpolitikkur hjá Fróðskaparsetri Føroya

**Samtyktur á setursráðsfundi 29.november 2005**

**Innihald**

**Bakgrund**
Fróðskaparsetur Føroya (hereftir nevnt Setrið) er ein útbúgvingar- og granskingarstovnur, har ein avgerandi partur av dagliga virkseminum er knýttur at KT-nýtslu.

Dyggar trygdarskipanir skulu tryggja, at Setrið kann teljast millum fremstu stovnar, bæði tá ið talan er um útbúgving og gransking. Setrið vil vera stovnur, har allar KT-skipanir eru tíðarhóskandi og álítandi. Hetta skal tryggja, at allar upplýsingar og alt samskifti, sum er latið í trúnaði, verður goymt og viðgjørt trygt.

KT-trygd merkir, at alt tilfeingið verður vart væl og virðiliga. Setrið vil, at allar skipanir skulu lúka øll lógarkrøv um KT-trygd, men samstundis skulu skipanirnar vera brúkaravinarligar. KT-trygdin skal tryggja stovnin móti hóttanum av náttúru-, menniskja- og tekniskum ávum.

**Gildisøki**
KT-trygdarpolitikkurin er galdandi fyri øll, sum nýta KT-útgerð hjá Setrinum og fyri alt brúk av KT-útgerð á Setrinum, uttan mun til hvør eigur útgerðina.

Skal trygdin vera nøktandi, er neyðugt, at allir einstaklingar, sum nýta KT-tilfeingið á Setrinum, eru medvitandi um trygdina. Tað merkir, at eingin skal vera undantikin at fylgja trygdarkrøvunum.

Allir brúkarar skulu kunnast um grundleggjandi reglur fyri KT-trygd og møguligar avleiðingar fyri KT-tilfeingið, tá brot verða gjørd á reglurnar, lutvíst fyri virksemið á Setrinum og lutvíst tann einkulta persónin.

**Málsetningur fyri KT-trygd**
Trygdararbeiðið er bygt á trý grundleggjandi trygdarkrøv:

Hesi mál skulu skiljast sum ein ætlanaryvirlýsing um stovnan av einum hóskandi trygdarstøði, sum lutvíst skal tryggja virðing av lógarkrøvum og lutvíst er fastlagt eftir eini váða- og kostnaðarmeting. Setrið ynskir tó sum minstakrav at uppfylla tey grundleggjandi krøvini í BS 17799.

*Integritetur* : at upplýsingar eru rættar og fullfíggjaðar og at KT-skipanir virka sum tær skulu
*Trúnaður* : at upplýsingar einans eru atkomiligar hjá teimum, sum skulu hava atgongd til tær
*Atgongd* : at góðkendir brúkarar hava atgongd til upplýsingar, tá teir hava brúk fyri tí

Gjøgnumgongdin av meginreglunum í komandi parti skal skiljast sum ein nágreining av tí, vit kalla *eitt hóskandi trygdarstøði.*

**Meginreglur**

**Leiðsluviðurskifti**
*Ábyrgd*
Rektari Setursins hevur høvuðsábyrgdina av KT-trygdini.

Setursráðið hevur ábyrgdina av trygdini og ásetir uppgávu- og ábyrgdarbýti í sambandi við tey einstøku virkisøkini. Setursráðið hevur ábyrgd av, at einstaklingar, sum nýta KT-tilfeingi hjá Setrinum, eru kunnaðir

um KT-leiðreglurnar á Setrinum. Ein og hvør persónur á Setrinum hevur á henda hátt samábyrgd fyri KT-trygdini.

*Stjórnarreglur*
KT-trygd er eitt felagsmál fyri allan stovnin og verður stýrd av einum settum KT-ráði í samsvari við tær reglur og mannagongdir, sum eru partur av trygdarskipanini.

KT-trygdarráðið er mannað við 1 umboði (KT-trygdarumboð) frá hvørjari deild og KT-tænastuni. Umboðið frá KT-tænastuni er formaður í ráðnum og er í dagliga arbeiðinum KT-trygdarsamskipari.

KT-trygdarráðið skipar fyri dagligu KT-tiltøkunum. KT-trygdarráðið hevur skyldu til at kunna seg um KT-trygdarviðurskifti bæði uttanhýsis og innanhýsis. KT-trygdarráðið hevur skyldu til at tryggja, at neyðug trygdartiltøk verða sett í verk og gjøgnumførd í teimum ymisku eindunum á Setrinum. KT-trygdarráðið vegleiðir leiðslu, starvsfeløgum og lesandi í trygdarspurningum. Ráðið samskipar tiltøk í sambandi við KT-trygdina.

*Virkissundurskiljing (segmentering)*
Uppsettar verða reglur fyri virkissundurskiljing, tí hetta er ein grundleggjandi fortreyt fyri fyribyrgjan og avmarkan av avleiðingum, sum stava frá feilum, óhappum, sannprógvaðum negativum virki elvdum av einkultpersónum.

***Óheft av lyklapersónum***
Stílað verður ímóti, at skipanin skal vera óheft av einstaklingum. Tað verður gjørt við at tiltaksfólk eru fyri tey starvsfólk, sum eru einsamøll um at røkja serøki ella skipanir, sum eru av stórum týdningi fyri Setrið. Harafturat skal skjalatilfar til hesi øki dagførast og møguliga økjast.

***Revsitiltøk***
Reglur verða gjørdar um revsing móti teimum, sum gera brot ella royna at gera brot á KT-trygdarásetingarnar.

**Atgongd**
*Rakstrarórógv*

Rakstrarórógv skal fyribyrgjast mest møguliga við:

- fyribyrgjandi tiltøkum, m.a. mannagongdum fyri góðskutrygging, stýring av broytingum og viðlíkahaldi av skjalatilfari
- vandamálshandfaring, m.a. mannagongdum fyri skaðarætting, útbreiðslu, umbeining ella tílíkt, á ein slíkan hátt at ikki verður farið útum avtalaða atgongd

Av tí at hetta økið er serliga týdningarmikið fyri Setrið, verður væntað at frágreiðing verður latin KT-trygdarráðnum gjøgnum tað staðbundna KT-trygdarumboðið um hendingar og ætlaði tiltøk fyri at bøta um støðuna.

Regluligt trygdaravrit verður tikið, so tað skjótt kann bøtast um møguliga rakstrarórógv.

*Stórskaðaumstøður*
Roynt verður at sleppa undan stórskaða, sum stendst av skammlopi, eldi ella vatni, við at hava eina væl tilrættislagda fysiska trygd og eftirlit við bygningum, tøkniligum innleggingum og KT-útbúnaði. Ein váðakanning skal gerast, og út frá metingini av váða samanborið við útreiðslur til trygd, verður støddin á tilbúgvingini ásett.

Tað skal verða ein tilbúgvingarætlan fyri:

- tiltøk at avmarka skaðan
- íverksetan av eini fyribilsloysn
- íverksetan av varandi loysnini aftur

men bert fyri tær neyðstøður, sum av leiðslu Setursins eru mettar at vera vandamiklar.

Fyri at tilbúgvingarætlanirnar kunnu virka sum ætlað, mugu fylgjandi fortreytir vera uppfyltar:

- Tilbúgvingarætlanirnar skulu javnan dagførast og roynast í minsta lagi eina ferð um árið, uml. 1. oktober
- Trygdaravrit og eykaútbúnaður skulu goymast í einum øðrum brandøki enn har upprunatilfarið og tann útbúnaður, sum er í rakstri, eru.

**Trygdin á KT-skipanunum**
Fyri at tryggja, at KT-skipanirnar hjá Setrinum virka í samsvari við kravfestingina, og at hava neyðugt eftirlit við at viðgjørd og framleidd data eru røtt og fullfíggjað, skal:

- neyðugt eftirlit innbyggjast í skipanirnar undir menningini
- menningarmyndilin fyri skipanir og broyting av skipanum verða fylgdur, herundir skulu eisini krøv viðvíkjandi góðskutrygging og skjalfestan verða hildin.

**Viðurskifti viðvíkjandi atgongd**
*Forðan fyri atgongd*

Øll KT-útgerð, t.v.s. bygningar, KT-rúm, tólbúnaður, ritbúnaður, data og datamiðlar skulu verjast móti ikki loyvdari atgongd.

At røkka hesum máli verða brúktar eftirlitsskipanir, sum umframt at hava eftirlit við atgongd eisini ávara og gjøgnum logg eru grundarlag fyri eini møguligari kanning.

*Mannagongdir fyri atgongd*
Mannagongdir um atgongd (fysiska og logiska) skal innihalda:

- reglur fyri, hvør kann brúka hvørja KT-útgerð.
- reglur fyri, hvussu og í hvørjum føri atgongd verður givin og tikin aftur
- reglur fyri trygdareftirlit, logg, eftirlitskanning, leiðslufráboðan og uppfylging

**Krøv viðvíkjandi trygdarhondbók**
Í trygdarhondbókini skal vera:

- KT-trygdarpolitikkurin hjá Setrinum
- Lýsing av trygdarstýringsskipanini
- Lýsing av uppgávunum hjá KT-trygdarráðnum og KT-trygdarumsitingini
- Almennar mannagongdir og reglur

Almennu mannagongdirnar og reglurnar um KT-trygd verða gjørdar eftir trygdarstandardinum ISO 17799 . Innihaldið er evnað til og mett um í samsvari við KT-trygdarpolitikkin hjá Setrinum.

Innihaldsyvirlitið verður tí:

1 Inngangur
2 Yvirskipaðar mannagongdir
3 Trygdaríverksetan
4 Skráseting og flokking av KT-útbúnaði
5 Starvsfólkatrygd
6 Fysisk trygd
7 Stjórnan av rakstri fyri KT-skipanum og netverki
8 Eftirlit við atgongd til skipanir, data og netverk
9 Menning, veitan og viðlíkahald av KT-skipanum
10 Tilbúgvingarætlan
11 Uppfylging av lógarbundnum og sáttmálabundnum krøvum

Postrúm 272 FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14 FO 100 Tórshavn | Heimasíða www.setur.fo | Teldupostur setur@setur.fo | Telefon: 35 25 00 | Faks: 35 25 01